# Hava fund um at lata flakavirkið í Vági upp



– Vit fara nú at greiða Framtaksgrunninum frá, hvat landsstýrið heldur um flakavirkið í Vági. Men Landsstýrið kann ikki krevja, at Fiskavirking skal lata tað uppaftur, viðgongur løgmaður

**Landsstýrið og Framtaksgrunnurin fara nú á fund, har flakavirkið í Vági er eitt mál á skránni**

FLAKAVIRKIÐ Í VÁGI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hildið verður nú fram við royndunum at fáa flakavirkið hjá Fiskavirking í Vági uppaftur.

Fríggjadagin fara Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum og Jóannes Eidesgaard, løgmaður á fund við Framtaksgrunnin um ymisk viðurskifti.

Á fundinum fara partarnir at tosa um ymisk viðurskifti hjá Fiskavirking og Framtaksgrunninum.

– Men tað er ongin loyna, at vit ætla eisini at tosa við Framtaksgrunnin um flakavirkið í Vági, sigur Jòannes Eideagaard, løgmaður.

Hann sigur, at á hesum fundinum ætlar landsstýrið at fáa at vita, hvørja ætlan Framtaksgrunnurin hevur við flakavirkinum í Vági.

Landstýrið vil hava at vita, um ætlanin er at lata virkið uppaftur, ella um ætlanin er at selja virkið ella um ætlanin er onki at gera.

Løgmaður veit, at landsstýrið kann ikki geva Framtaksgrunninum harraboð, tí talan er um ein sjálvstøðugan grunn, sum er óheftur av politisku skipanini.

Hinvegin er hann púra ósamdur við stjóran í Fiskavirking, sum átalaði løgmann fyri at leggja seg út í privat, vinnuligt virksemi, tá ið hann bæði í Sosialinum og á Løgtingi í farnu viku reistu málið um flakavirkið í Vági.

– Sjálvandi skal landsstýrið hava áhuga fyri serligum viðurskiftum, sum raka ein heilan landspart, sigur løgmaður. Og tað umfatar eisini tey vinnuligu viðurskiftini, serliga tá ið støðan í landspartinum er so vánalig, sum hon er í Suðuroy í løtuni.

Og hann sigur, at eitt endamál við fundinum er at fortelja Framtaksgrunninum, hvørja áskoðan landsstýrið hevur á flakaravirkið í Vági.

– Tað hevur týdning, at Framtaksgrunnunin veit, hvørja støðu, landsstýrið hevur.

– Men so stendur tað sjálvsagt til Framtaksgrunnin um hann tekur áskoðanina hjá Framtaksgrunninum við í sínum metingum, tá ið framtíðar virksemið skal leggjast til rættis.

Sostatt viðgongur hann eisini, at vil Fiskavirking ikki lata virkið í Vági upp, er tað onki, sum landsstýrið kann gera.

– Framtaksgrunnurin og Fiskavirking er óheft av politisku skipanini. Hóast tað er landsstýrið, sum velur nevndina í Framtaksgrunninum, eiga vit at virða, at hon sleppur at arbeiða óheft av politisku skipanini.

– Men eg ivist ikki í, at nevndin í Framtaksgrunninum er so mikið at sær komin, at hon eisini hevur í huganum, hvørji samfelagsins áhugamál eru og tað er hetta, sum landsstýrið ætlar at greiða nevndini frá á fundinum.

– At seta Framtaksgrunninum beinleiðis krøv, kann landsstýrið ikki gera, leggur hann afturat.

Sumbingar vilja:

# Hava borgarafund og fólkaatkvøðu

**Sumbingar savna nú inn undirskriftir fyri at fáa borgarafund um ætlaðu samanleggingina við Tvøroyri. Tey krevja eisini fólkaatkvøðu um málið**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Sumbingar eru rættiliga farnir at ressast í spurninginum um samanlegging við Tvøroyri*

Sumbingar eru nú reiðiliga farnir at ressast.

Tað er spurningurin um samanlegging við Tvøroyri, sum hevur fingið teir upp úr stólinum.

*Útlitini eru nú fyri, at sumbingar gerast tvørafólk á nýggjárinum - ella var tað øvugt?*

Men sumbingar halda, at teir hava fingið alt ov lítið at vita um hesa ætlanina. Og tey halda, at hetta er eitt so mikið álvarsligt stig at taka, at tey vilja hava bygdaráðið at kalla saman til borgarafund um málið.

Hesar seinastu dagarnar hava fólk gingið runt í bygdunum í kommununi og savna undirskriftir, har tey heita á kommununa um at hava borgarafund um málið.

Har ætla tey at borgararnir í kommunu skulu fáa høvi til at siga sína hugsan um ætlanina at leggja saman við Tvøroyri.

Har vilja tey eisini hava, at bygdaráðið skal fortelja borgarunum, hvat ein samanlegging ber í sær og hvørja ávirkan tað fær á Sumbiar Kommunu og fólkið, sum har býr.

Tey vilja hava hendan borgarafundin sum skjótast, áðrenn samráðingar verða tiknar upp við Tvøroyrar Býráð um samanlegging.

Og tey beinleiðis krevja, at fólkaatkvøða skal verða í Sumbiar Kommunu um spurningurin um samanlegging fyri at vita, hvat fólkið heldur.

## Fólkið má spyrjast

– Nú vit hava savnað inn undirskriftir, hava vit ikki tikið støðu fyri ella ímóti samanlegging, sigur Hildur Vestergaard, sum er ein av teimum, sum hevur gingið hús úr húsi og savna undirskriftir.

Men hon heldur at málið um samanlegging við Tvøroyri, er ein alt ov stórur og umfatandi spurningur, til at ein meiriluti í bygdaráðnum kann taka støðu einsamallur, uttan at spyrja fólkið eftir.

Hon sigur, at áfundinum vilja tey hava lýst, hvørjir fyrimunir og vansar eru við eini samanlegging.

– Vit eiga ikki at leggja saman við Tvøroyri uttan so, at tað er ein fyrimunur fyri okkum. Men tað vita vit onki um ogtí vilja vit hava borgarafund at fáa kommunustýrið at lýsa støðuna fyri okkum.

Hon sigur, at ongin í kommununi veit enn, hvat ein samanlegging við Tvøroyri inniber.

Og hon leggur afturat, at endar tað við, at kommunustýrini í Sumba og á Tvøroyri semjast um eina avtalu um samanlegging, má hendan avtalan leggjast til fólkaatkvøðu.

Tí fýlist hon á úttalilsi hjá borgarstjóranum í Sumba í Sosialinum, har hann sigur, at tað er ikki greitt, um fólkaatkvøða verður.

Nú tey hava savnað inn undirskriftir, hava tey bara fingið undirskriftir frá fólki, sum hava valrætt í kommununi.

Í gjáramorgunin høvdu tey fingið 170 undirskriftir, men tey vóru ikki reiðiliga liðug at savna inn.

À seinasta løgtingsvali høvdu 310 fólk atkvøðurætt í kommununi, 218 fólk í Sumba og 92 fólk í Lopra og á Økrum.



# Halt teg til samgonguskjalið

**Bæði formaðurin í fíggjarnevndini, Anfinn Kallsberg, og formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, mæla Kristiani Magnussen til at halda seg til avtaluna um skattalættan í samgonguskjalinum. – Tað er púra galið og ein ósiður at viðgera fíggjarlógina í fjølmiðlunum, áðrenn fíggjarlógararbeiðið er liðugt, heldur Anfinn Kallsberg**

SKATTALÆTTIN

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Tað er púra galið og ein ósiður at viðgera fíggjarlógina í fjølmiðlunum, áðrenn fíggjarlógararbeiðið er liðugt. Eg taki ikki útsøgnina hjá honum so tungt, tí Javnaðarflokkurin hevur undirskrivað eitt samgonguskjalið, sum eg vænti teir halda seg til, sigur Anfinn Kallsberg*

*Mynd: Savnsmynd*

Hugsjónarligu munirnir millum samgongufIokkarnar eru veruliga við at koma fram í ljósmála. Í summar hevur vitjanin av Bjørn Lomborg og útlendingamálið víst, at hugsjónarliga er vítt til veggja í samgonguni, og at samgongustevið ikki er av tí besta.

Feskasta dømið um órógv í samgonguni er ætlaði skattalættin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen.

Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin er á einum máli um, at sonevnda skattanýskipanaruppskotið hjá samgonguni skal fremjast í verki á komandi fíggjarlóg, meðan einstakir tinglimir í Javnaðarflokkinum aftra seg við at taka undir við einum skattalætta.

## Undirskrivað avtala

Í Degi og viku týskvøldið greiddi formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, frá, at hann helt tað vera ábyrgdarleyst at lata ein skattalætta á komandi fíggjarlóg, tí landskassin var so mikið sperdur, at vit hava ikki ráð at lata skattalætta í komandi ár.

Fyrrverandi løgmaður og formaðurin í fíggjarnevndini, Anfinn Kallsberg, heldur lítið um framferðarháttin hjá Kristiani Magnussen.

– Tað er púra galið og ein ósiður at viðgera fíggjarlógina í fjølmiðlunum, áðrenn fíggjarlógararbeiðið er liðugt. Eg taki ikki útsøgnina hjá honum so tungt, tí Javnaðarflokkurin hevur undirskrivað eitt samgonguskjalið, sum eg vænti teir halda seg til, sigur Anfinn Kallsberg.

Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, mælir eisini Kristiani Magnussen til at halda seg til samgonguskjalið, sum Javnaðarflokkurin hevur undirskrivað.

## Broyttar fortreytir

Kristian Magnussen vísti í Degi og viku á, at hann metti, at tær fortreytir fyri skattalættanum, sum Javnaðarflokkurin tók undir, tá samgonguskjalið varð undirskrivað, ikki er veruleikin í dag. Formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins segði, at búskaparstøðan í Føroyum er munandi verri enn upprunaliga mett.

– Eg haldi ikki, at fortreytirnar eru broyttar nakað. Allir tríggir samgonguflokkarnir vistu fullvæl, at inntøkurnar í landskassanum vóru dalandi, meðan útreiðslurnar fóru at økjast, sigur Anfinn Kallsberg.

Kaj Leo Johannesen hevur somu áskoðan sum samgongulimurin, Anfinn Kallsberg, og vísir á, at tað er júst somu fortreytir fyri skattalættanum í dag, sum tá samgonguskjalið varð undirskrivað í februar mánað.

## Tung telving

– Uttan mun um talan er um góðar tíðir ella ringar tíðar, so er fíggjarlógararbeiðið altíð stríggið, og eg vænti ikki, at hetta fíggjarlógaruppskotið verður øðrvísi.

Anfinn Kallsberg sigur seg vænta eitt tungt talv, nú seinasta hond skal leggjast á fíggjarlógina fyri 2005. Hann vísir á, at Fólkaflokkurin ætlar at tvíhalda um skattalættan undir fíggjarlógarsamráðingunum, hóast røddir eru frammi úr Javnaðarflokkinum um at tað er ábyrgdarleyst at veita ein skattalætta.

Skattanýskipanaruppskotinum hjá samgonguni er knýtt at einari samhaldsfastari eftirlønarskipan, og spurdur, um Fólkaflokkurin fer at taka undir við samhaldsføstu eftirlønarskipanini, svarar Anfinn Kallsberg, at Fólkaflokkinum dámar ikki skipanina, men flokkurin kennir seg noyddan at taka tað súra við tí søta, sum hann málber seg.

Her sipar formaðurin í fíggjarnevndini til, at Fólkaflokkurin góðtekur samhaldsføstu eftirlønarskipanina um flokkurin fær skattalættan ígjøgnum.

# Landspolitikkurin dregur

**Hvørki Helena Dam á Neystabø, Rói Egholm ella Kristina Háfoss verða millum valevnini á býráðsvalinum í november mánað**

BÝRÁÐSVAL

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tey gjørdust øll ov stutt á seinasta løgtingsvali, og megnaðu ikki at vinna seg inn um tinggátt. Tað hevur verið tutlað í krókunum um, at tey nú ætla sær at royna seg býráðspolitikki, men so verður kortini ikki.

Hóast øll trý óiva høvdu verið millum atkvøðuslúkararnar á kommunuvalinum, hava Helena Dam á Neystabø, Rói Egholm og Kristina Háfoss gjørt av, at tey ikki ætla sær at stilla upp til býráðsvalið.

Øll siga, at tað er landspolitikkurin, sum serliga hevur størstan áhuga, og tískil ynskja tey at halda seg aftur nú býráðsvalið stendur fyri durum.

# Teitur kann fáa amerikanska virðisløn

**Føroyski tónleikarin Teitur Lassen er nú í uppskoti til eina tónlistavirðisløn í USA**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*



Teitur Lassen er nú komin í gott selskap í USA.

Hann er ein av teimum, sum er í uppskoti til eina tónlistavirðisløn, sum kallast »The Short List Music Prize 2004 for Artist Achievement in Music«.

Hetta er ein virðisløn, sum felagsskapurin The Shorlist Organization letur á hvørjum ári til tað mest skapandi og listarligu útgávuna í USA.

Í ár eru nøvn sum Norah Jones, Roberth Smith, Jack Black, John Mayer og so Teitur Lassen í uppskoti.

Samanlagt eru 73 tónleikarar útnevndir, men um tvær vikur verða 10 finalistar valdir, og vinnarin av virðislønini verður kosin tann 11. november.

## Rætting

Í blaðnum mikudagin kom blaðmaðurin at gera borgarstjóranum í Kirkjubøar kommunu órætt. Skrivað varð, at Anfinn Brekkstein fyri fyrstu ferð varð valdur í Kirkjubøar kommunu í 1992, men hetta er ikki rætt. Anfinn varð fyrstu ferð valdur í kommuna í 1988 og frá 1997 hevur hann røkt borgarstjórasessin í kommununi.

**páll**

# Lærið at fiska við flugu

**Sunnudagin verður skipað fyri skeiði í at fiska við flugu**

SKEIÐ

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Sunnudagin skipar Sílaveiðufelagið fyri skeiði í at fiska við flugu. Felagið hevur fingið norðmannin, Arnstein Friberg, at standa fyri skeiðnum. Hetta er á fyrsta sinnið, at Sílaveiðufelagið skipar fyri tílíkum skeiði.

Stigtakarin til skeiðið, William West, sigur, at skeiðið fyrst og fremst er ætlað óroyndum flugufiskarum og teimum, ið hava vant nakað. Skeiðið byrjar klokkan 13 sunnudagin á Leynavatni og stigtakararnir vænta, at skeiðið er liðugt um seks tíðina sunnukvøldið.

Kostnaðurin fyri skeiðið er 300 krónur hjá limum í Sílaveiðufelagnum og 400 krónur fyri tey, ið ikki eru limir. Til ber at melda seg til skeiðið á telefon 311700, 211700 ella 215272.